Jógvan Arge nógv umrøddur á fundi um útvarp

Eitt evnið á almenna fundinum í John's Resturant mánakvøldið um útvarp og fjølmiðlar, var starvið hjá Jógvani Arge, sum er programmleiðari í Útvarpi Føroya. Tað var Ivan Johannesen, sum setti hol á hetta mál.
- Samstundis, sum maðurin bæði er løgtingsmaður, býráðslimur í størstu kommunu í landinum og eitt nú limur í rættarnevnd løgtingsins, er hann eisini programmleiðari í Útvarpi Føroya. Hetta haldi eg vera skeivt, segði Ivan Johannesen

FJØLMIÐLAR
Vilmund Jacobsen

Mánakvøldið skipaðu sambandsfelagið og fólkafloksfelagið í Eysturoy fyri almennum fundi um útvarp og fjølmiðlar í John's Resturant í Saltangará.

Eini 30-40 fólk møttu á fundinum, sum serliga viðgjørdi evnið: "Røkir útvarpið sína skyldu á nøktandi hátt?"

Við pallborðið sótu Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, sum var møttur fyri Óla Breckmann, Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, Ivan Johannesen, sum tók við landsstýrissessi eftir Sámal Petur í Grund, tá ið kringvarpslógin varð sett í verk og Eyðun Andreasen, fólkalívfrøðingur, sum eitt nú hevur granskað fjølmiðlar.

Tað var Jóhan Petersen, formaður í sambandsfelagnum í Eysturoy, sum beyð vælkomin og vísti á, hví feløgini høvdu valt at taka júst hetta evnið upp. Hann vísti á, hvussu stóra ávirkan útvarpið hevur á fólkið og legði annars dent á fjølmiðlaábyrgdarlógina, sum enn ikki er komin.

Júst hendan lógin, sum bíðað verður eftir, var høvuðsumrøðuevnið á fundinum.

Tá ið fundurin var liðugur, takkaði formaðurin í fólkafloksfelagnum í Eysturoy, Steintór Jacobsen, fyri góðan og áhugaverdan fund.

Sosialurin fer at venda aftur til fundin í John's Resturant í vikuni, tá ið betur pláss er í blaðnum.

Programmleiðarin

Eitt evnið, sum Ivan Johannesen setti hol á, var starvið hjá Jógvani Arge, sum er programmleiðari í Útvarpi Føroya, samstundis sum hann bæði er løgtingsmaður, býráðslimur í størstu kommunu í landinum og eitt nú limur í rættarnevnd løgtingsins.

- Eg havi einki ímóti manninum, men eg haldi tað vera skeivt, at programmleiðarin í útvarpinum samstundis er løgtingsmaður og býráðslimur.

Hann helt tað vera skeivt, at Jógvan Arge sum útvarpsmaður og politikari, hevur møguleikan at gera sítt til, at fjølmiðlaábyrgdarlógin, sum so leingi hevur verið ávegis, verður sett í verk.

Ivan helt eisini, at starvið sum programmleiðari gevur Jógvani møguleikar at uppreklamera seg sjálvan - um ikki beinleiðis, so óbeinleiðis við tað, at røddin hjá honum er at hoyra í fleiri sendingum hjá útvarpinum.

Ikki mismunur

Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, helt, at Ivan hevði tikið heldur rívan til.

- Ivan fekk tað at ljóða soleiðis, at Jógvan Arge kanska hevur havt áhuga í at forðað fyri ábyrgdarlógini - bara tí, hann er útvarpsmaður. Men eg haldi ikki, at Jógvan arbeiðir soleiðis.

Jógvan á Lakjuni greiddi frá gongdini við fjølmiðlaábyrgdarlógini, sum var eitt ríkislógartilmæli og vísti á, at danir avgjørdu at senda lógina aftur til Føroya av ávísum orsøkum.

- At málið síðan hevur drigið út, hevur nakað við sjálvstýrisgongdina at gera. Arbeitt verður við at yvirtaka málsøkið og seta lógina, sum annars er klár, í verk.

Jógvan á Lakjuni helt annars ikki, at útvarpið ger mismun millum politisku flokkarnar, men vísti á, at journalistarnir sjálvsagt hava ymiskar politiskar uppfatanir, sum kanska í ein ávísan mun kunnu síggjast aftur í tíðindaflutninginum.

- Men tá ið saman um kemur, haldi eg ikki, at mismunur verður gjørdur, segði hann.

Ikki persónurin, men prinsippið

Ivan Johannesen legði aftrat, at hann hevði ikki lagt Jógvan Arge sum útvarpsmann og politikara undir at viljað bremsað ábyrgdarlógini.

Jóhan Petersen legði dent á, at tað er ikki persónurin, Jógvan Arge, sum verður umrøddur, men programmleiðarin, sum eisini er politikari.

Hann helt ikki, at tað hevði gingið undir gomlu skipanini við útvarpsnevnd, at programmleiðarin í útvarpinum samstundis var politikari.

- Og tað hevði neyvan gingið í dag heldur, um Tjóðveldisflokkurin ikki átti mentamálaráðharran, sum umsitur útvarpið.

Jóhan vísti á, at Jógvan Arge er nógv at hoyra í útvarpinum, og tá ið val er, og Tjóðveldisflokkurin hevur politiskar framløgusendingar, er hann aftur at hoyra har.

- Hetta snýr seg ikki um persónin, men um prinsippið, legði hann dent á.

Hvítt og svart

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, segði, at tað, sum kann tykjast svart hjá einum, kann tykjast hvítt hjá einum øðrum.

- Hetta er eitt dilemma, vit hava.

Útvarpsstjórin vísti á reglurnar í grein 3 í lógini um lønir og eftirlønir hjá løgtingsmonnum.

Her stendur, at løgtingsmaður, sum hevur starv hjá tí almenna, hevur rætt til farloyvi í sínum starvi, men samstundis kann viðkomandi velja at hava eitt hálvtíðarstarv, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann.

Jógvan Jespersen segði, at hann tók ta avgerð at niðurleggja varastjórastarvi í útvarpinum, sum Jógvan Arge hevði.

- Síðan var hálva programmleiðarastarvið, sum Jógvan Arge hevur, skipað soleiðis, at hansara ábyrgdarøki er avmarkað til sendingar um eitt nú átrúnað, barnaútvarp, siðsøgu, mentan og ítróttarfrásagnir. Hin helmingin av programmleiðarastarvinum røkir útvarpsstjórin fyribils, segði hann.

Útvarpsstjórin segði, at tey royna at hava gøtuna so reina sum tilber, soleiðis at minst møguligt er at finnast at.

Jógvan Jespersen segði seg sakna fjølmiðlaábyrgdarlógina og vísti á, at tað eisini er eftir áheitan frá Útvarpi Føroya, at løgtingsins umboðsmaður hevur heitt á myndugleikarnar um at fáa hesi viðurskifti uppá pláss.

- Hetta er ikki komið nóg týðiliga fram, segði útvarpsstjórin.

Leikluturin hjá Jógvani Arge, programmleiðara í útvarpinum og politikara, varð nógv umrøddur á fundinum um útvarp og fjølmiðlar í Saltangará mánakvøldið

TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS

Tyrluflúgvingin á hvítusunnu 2003

2. hvítusunnudag verður flogið sum sunnudag.
Sunnudagin 8. juni verður ikki flogið.

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo

Seinasta royndin miseydnaðist

Stólarnir skuldu brúkast í góðveðrinum uttanfyri, meðan arbeiðsgevarar og arbeiðarafeløgini samráddust fyri seinastu ferð
Mynd: Jens K. Vang

Arbeiðsgevararnir góvu feløgunum í verkfalli eitt tilboð um lønarhækking, sum liggur umleið 3,90 krónur um árið. Arbeiðarafeløgini vrakaðu tilboðið, men førkaðu seg undir samráðingunum heilt niður á umleið 4,80 krónur. Sostatt er tað bara umleið ein króna upp á tímalønina, sum skilir partarnir í verkfalli

VERKFALL
Ingi Rasmussen

Verkfallið er skorið niður til at snúgva seg um eina krónu.

Tað var úrslitið aftaná seinastu royndina at semjast, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag tók stig til týsdagin.

Nú skuldi røkka ella støkka. Beint eftir klokkan 9 týsmorgunin hittust partarnir. Men longu eftir samráðingar í góðar tveir tímar kundi stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, staðfesta, at royndin miseydnaðist.

– Vit komu ikki á mál, og tað harmast vit sjálvandi um. Vit bjóðaðu arbeiðarafeløgunum aftur til samráðingarborðið, har vit samráddust við einum grundarlagi, sum lá millum 3,70 og 4 krónur um tíman í lønarhækking við eftirløn. Men eftir fundin kunnu vit staðfesta, at tað grundarlagið er ikki til staðar. Feløgini í verkfallið liggja framvegis nakað omanfyri. Nú møtast partarnir ikki aftur. Hetta var okkara síðsta royndi, tí vit kunnu ikki liva við einari hægri lønarhækking, sigur Jan Mortensen.

Ikki bar til at fáa ein viðmerking frá Ingeborg Vinther, forkvinnu úr Føroya arbeiðarafelag ella nøkrum øðrum, ið umboða tey fimm arbeiðarafeløgini í verkfalli: Føroya arbeiðarafelag, Havnar arbeiðsmannafelag, Havnar arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag.

Ein króna á muni

Hóast partarnir nú eru farnir hvør til sítt, so er ikki so langt millum partarnar longur. Grundarlagið hjá arbeiðsgevarunum varð sum nevnt at samráða seg til eina loysn, sum lá millum 3,70 og 4 krónur, men samstundis leggja teir dent á, at tað ikki merkir fýra krónur. Helst umleið 3,90 krónur um árið íroknað eftirløn.

Arbeiðarafeløgini hava higartil tvíhildið um, at tey ongantíð hava vikað seg frá teimum 8 krónunum í lønarhækking um árið. Men Sosialurin skilir, at feløgini nú eru komin niður í góðar fýra krónur í lønarhækking, pluss eftirløn, so at samlaða lønarhækkingin liggur um 4,80 fyri tíman um árið næstu tvey árini. Ella sagt øðrvísi, tað er stórt sæð bara hækkingin í eftirlønini, sum liggur ímillum partarnar.

Kortini bar onki til, og partarnir fóru til sítt umleið klokkan 11 fyrrapartin týsdagin.

Sá annars bjart út

Tað sá annars út til, at partarnir høvdu veruligan hug at finna eina semju týsmorgunin. Umleið klokkan 9.10 hittust partarnir í kjallaranum í húsunum hjá Havnar arbeiðskvinnufelag í Havn. Uttanfyri var heiður himmal og fuglaljóð, og lagið var gott, tá tey tólv samráðingarfólkini, ið umboðaðu arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar, tóku í hondini á veg til samráðingarborðið, ið var stillað í runding.

Longu eftir tíggju minuttum varð fyrstu stegður í samráðingunum. Arbeiðarafeløgini fóru uppá til nevndarlimirnar í teimum fimm arbeiðarafeløgunum, sum sótu og bíðaðu, at lodda dýpið. Stutta løtu fóru tey niður aftur í kjallaran, og soleiðis gekk slagið nakrar ferðir. Til tað um ellivu tíðina slitnaði.

Arbeiðarafeløgini vildu ikki koma niður at samráðast við støði í grundarlagnum hjá Føroya arbeiðsgevarafelag og Havnar arbeiðsgevarafelag.

Tveir møguleikar

Landið liggur í andaleypi, og spurningurin er nú, hvat hendir. Feløgini hava ikki meira at tosa um, og tí eru bara tveir møguleikar eftir. Antin koma semingsmenninir upp í leikin, tí nú er bara ein króna ímillum. Ella leggur løgtingið uppí.

Løgtingslimir fingu mánadagin tey greiðu boðini frá Havbúnaðarfelagnum, at verður onki gjørt nú, og verkfallið heldur fram í daga- kanska vikuvís, so lata nøkur alivirki ikki uppaftur. Sostatt noyðist løgtingið helst at leggja uppí. Um ikki annað fyri at gera undantøk fyri alivinnuna.

Helst var tað ein forklæringstrupulleiki, sum beindi fyri síðstu royndini. Tað hevði verið torført hjá arbeiðarafeløgunum at greitt sínum limum frá, hví tey hava verið í verkfalli so leingi fyri eini loysn, ið líkist seinasta semingsuppskotinum frá semingsmonnunum.

Hinvegin liggur 3,70 krónur á borðinum sum seinasta semingsuppskot, og tað verður hetta, sum løgtingið skal taka stig til í einum møguligum politiskum inntrivi. Kanska hildu arbeiðarafeløgini, at 20 oyru vóru ov lítið at boyggja seg fyri.

Í góðveðrinum uttan fyri samráðingarhølið tóktist tað eisini at vera støðan.

– Nú hava vit stríðst so leingi, at nú selja vit okkum ikki fyri onki, segði ein nevndarlimur.

Hóast tey kurteisliga tóku í hondina á hvørjum, so var heilsanin ikki beinleiðis hjartalig, tá Ingeborg Vinther og Vilhelm Johannesen hittust til samráðingar týsdagin
Mynd: Jens K. Vang

FAG kærir sína neyð hjá løgmanni

Nú stendur tað til løgmann at taka støðu til, um politiski myndugleikin skal loysa knútin. Týsdagin fekk hann bræv frá Føroya arbeiðsgevarafelag

VERKFALL
Ingi Rasmussen

Føroya arbeiðsgevarafelag ásannar, at felagið kemur ikki longur í samráðingunum við arbeiðarafeløgini.

Soleiðis innleiðir felagið eitt bræv, sum varð borið løgmanni og landsstýrismanninum við arbeiðsmarknaðarmálum klokkan 11.45 týsdagin.

Brævið er ein kunning um seinasta leikin í verkfallinum. Felagið greiðir frá, at tað mánadagin tók stig til seming fyri at gera eina seinastu royndina at fáa ein enda á verkfallinum. Tilboðið til arbeiðarafeløgini var at samráðast um eina lønarhækking, sum lá millum 3,70 og 4 krónur. Arbeiðarafeløgini játtaðu at halda fund á hesum grundarlagi. Tó uttan binda seg frammanundan.

Royndin miseydnaðist, tí arbeiðarafeløgini góðtóku ikki at samráðast á tí grundarlagi, sum var avtalað, siga arbeiðsgevararnir.

– Føroya arbeiðsgevarafelag ásannar tí, at felagið fær ikki gjørt meira fyri at loysa trætuna á arbeiðsmarknaðinum. Føroya arbeiðsgevarafelag kann ikki slaka meira, tí sum búskaparliga støðan er vorðin, hóttir hetta arbeiðspláss, og útflutningsvinnan kemur í svárar trupulleikar. Hesum hvørki kunnu ella vilja vit taka ábyrgdina av, skrivar Føroya arbeiðsgevarafelag í brævinum, sum er undirskrivað av Vilhelm M. Johannesen, formanni.

Løgmaður var ávegis til Føroya, tá Sosialurin fekk orðið á hann og kunnaði hann um støðuna. Hann segði, at støðan nú var so álvarslig, at málið verður tikin upp í somu løtu hann er komin í Tinganes.